

*Vakra, klassiska kvinnulýsing Tizians: 'Venus úr Urbino' frá 1538*



*Gróðursamar kvinnur í mynd Rubens: 'Tær tríggjar gratiurnar' 1636-38*

stílblandið er ikki av leið, tí myndin inniheldur ávirkanir frá klassiskari list, samstundis sum myndin er ovurmoderna og harumframt fangar ótrúliga nógv rák í samtíðini. Hóast myndevnið er klassiskt, tykjast kvinnurnar í mynd Picassos nakað væl minni blúgvar enn í teimum gomlu klassisku lýsingunum. Medferð og huglag minnir meira um tátíðar franskar pornomyndir, hvørs kvinnulýsingar eru meira ágangandi, men kanska eisini daprari enn tær heilsugóðu og eiggiligu kvinnurnar hjá Rubens. Á maskunum og teimum maskukendu andlitunum sæst íblástur frá frumkendari list, sum Picasso eins og mong onnur, byrjaði at samla uppá um somu tíð sum myndin stavar. Sjálvur nevnir Picasso Cézanne sum sína størstu inspiratión og tað er einki at ivast í, at Cézanne og hansara dentur á flatan og á fastan bygnað hevði alstóran týdning fyri myndina og kubismuna, eins og Van Gogh, Gauguin og Matisse og teirra dekorativa antirealisma eisini høvdu sína stóru ávirkan. Innihaldið í Demoiselles er fleirraddað og hevur umframt ta sosialu dimensjónina, sum viðger kvinnuleiklutin í einum bordelli, eisini eina biologiska, ið staðfestir ta náttúrligu kynsligu girndina. Maskurnar eru áhugaverdar í hesum sambandi, tí tær geva myndini brá av onkrum upprunaligum og villum og geva hugasamband til Freud og dulvitið. Men tað allarmest geniala og nýskapandi við Demoiselles d´Avignon er knýtt at filosofiska grundarlagnum, sum myndin er bygd á og sum óivað er ávirkað av uppdagingum í samtíðini, m.a. relativitetsteori Einsteins, har virðið av t.d. tíð og rúmi gerst treytað. Eitt tað mest merkisverda við Demoiselles d´Avignon er nevniliga, at hon inniheldur fleiri sjónarmið í senn. Um vit hyggja at teimum báðum kvinnunum, ið standa í miðjuni, eru eyguni avmyndað frammanífrá, meðan vit síggja nøsina frá síðuni.

## Eitt abstrakt hugtak

Hendan frá fyrstan tíð sera illa lýdda myndin skuldi gerast byrjanin til kubismuna, sum breyt við aldargamla, mimetiska listaidealið um at endurgeva veruleikan trídimensjonalt m.a. við nýtslu av sentralperspektivinum. Frá 1908-1911 mentu Picasso og Georges Braque (1882-1963) tað kubistiska málaríið, har teir m.a. rannsakaðu møguleikarnar í tveydimensjonala flatanum í landslags- og figurmyndum í mold- og grálittum myndum, sum fingu alstóran týdning fyri ta komandi abstraktu myndlistina. Picasso var eitt sonevnt undurbarn og hann var fullgreiður yvir síni evni og týdning fyri ta abstraktu myndlistina. Sjálvur segði hann: "Eg dugdi at mála sum Rafael, tá eg var 12 ára gamal. Tað tók mær eitt heilt lív at læra at mála sum eitt barn". Og hóast eitt sindur fýrkantað, er sitatið beinrakið um hetta torskilda hugtakið, sum upprunaliga sipaði til eitt nú kubistiska list og aðra ímyndandi list, ið var avskeplað ella einfaldað. Í dag verður hugtakið heldur ørkymlandi eisini nýtt um nonfigurativa myndlist.

## Genta

Hóast nógv ár eru millum frúnnar hjá Picasso og gentumyndirnar hjá Ingálvi av Reyni (1920-2005), eru tær nýggjaru bygdar á listarligar ásannanir, sum Picasso legði fyri. Íblástur sæst eisini á tí tálmaða litavalinum, ið eyðkennir kubismuna frá 1908, sum Ingálvur av Reyni lærdi umvegis danskar málarar sum Immanuel Ibsen og serliga Jack Kampmann. Tær mongu gentulýsingarnar hjá Ingálvi eru sera ymiskar alt eftir hvar hesin djarvi listamaðurin er staddur í síni menning. Summar eru nonfigurativar uttan nakran líkskap við veruleikans gentur, meðan tær flestu eru abstraktar í orðsins veruligu merking sum t.d. "Genta" frá 1972, ið Listasavn Føroya eigur. Í hesu myndini ber til at skyna á eitt gentuskap við høvdi, hálsi og kroppi mitt í myndini, ið eisini verður undirstrikað av vertikala myndaformatinum. Men í staðin fyri at endurgeva veruleikan, verður myndevnið tulkað og einfaldað soleiðis, at hugmyndin stendur eftir. Hetta sæst kanska enn greiðari í frálíku lítlu myndini "Liffa" frá 1981, hvørs litir og dynamisku strok er tulking listamansins av eini litríkari og livandi persónligheit. Tað var m.a. omanfyrinevnda Jack Kampmann (1914-1989) fyri at takka, at franska listin í stóran mun kom at ávirka heimligu listina. Hann hevði sjálvur stóran áhuga fyri Cézanne og sum listaformidlari og lærari fekk hann alstóran týdning fyri føroysku listina.

## Føroysk kubisma?

At ein annar týdningarmikil listamaður, Zacharias Heinesen (1936) eisini hevur sans fyri dekorativum, abstraktum damum, prógvaði framsýningin ZH06, sum var at síggja í Listahøllini í Skipasmiðjuni í Havn. Í hansara vøkru tekningum sást ein týðiligur og viðurkendur íblástur frá Picasso. Zacharias Heinesen er kanska meira kendur fyri landslýsingarnar, sum at kalla hava myndað skúla innan føroysku myndlistina. Hesin stílurin verður javnan skýrdur kubistiskur, men spurningurin er hvussu nógv er í hesum. Í øllum førum er talan ikki um tað filosofiskt grundaða, intellektuella rákið, sum kubisman upprunaliga var. Føroyska kubisman hongur helst saman við teirri sannroynd, at tann abstrakti og geometriserandi málihátturin hóskar væl til lýsingar av føroyska landslagnum, sum frammanundan tekur seg rættiliga puntut út. Um somu tíð eru myndir Zacharias Heinesens meira naturalistiskar og meira abstraktar enn tær 100 ára gomlu damurnar hjá Picasso.



*Ein av teimum kendu landslagsmyndunum hjá Zachariasi Heinesen*



*Jógvan Asbjørn Skaale var helst inspireraður av Picasso umvegis Ingálv av Reyni, tá hann málaði 'Kvinna' í 2005*